Gransking í Føroyum: Avbjóðingar fyri framman

Martin Zachariasen
Dekanur, Náttúruvísindi, Syddansk Universitet

13. mai 2016

Hvat er gransking?

Gransking er…menniskju

Gransking snýr seg fyrst og fremst um menniskju, sum eru forvitin, dugnalig, ágrýtin og viljasterk – og sum seta sær fyri at finna svar uppá vísindaligar spurningar.

At fáast við gransking er ein sterkt persónlig drívkraft, sum ikki krevur eksterna motivatión, men sum krevur røttur karmarnar og ressursir.



Gransking er…tøkni

Nýmótans gransking – serliga innan náttúruvísindi, heisluvísindi og verkfrøði krevur umfatandi tøkni.





Gransking er…fígging

Gransking krevur umfatandi fígging – løn til granskarar og fígging af tøkni og infrastrukturi til gransking.

granskingarráðið THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF EDUCATION, RESEARCH AND CULTURE

LUNDBECKFONDEN

HORIZON 2020

CARLSBERGFONDET

VILLUM FONDEN

Gransking er…samstarv og kapping

Nógv gransking krevur samstarv við granskingarfelagar – eisini tvørtur um vísindaøki. Samstundis er kappingin um granskingarfígging sera hørð, og á nógvum økjum verður kappast um at koma fyrst við slógbrótandi úrslitum.

Gransking er…lokal og global

Gransking kann snúgva seg um lokal samfelagviðurskifti, mál og mentan. Gransking eisini vera global og óheft av lokalum viðurskiftum – tað er ofta so innan náttúruvísindi og verkfrøði.

Gransking er…stuttskygd og langskygd

Gransking kann snúgva seg um at loysa eina aktuella, kanska kommersielt átrokandi avbjóðing. Gransking kann eisini snúgva seg um at svara uppá grundleggjandi spurningar um lívið og universið.

Politisku karmarnir fyri gransking í Føroyum

Politisku karmarnir fyri gransking í Føroyum: Vitan & vøkstur

4. mai 2006
Lóg um Føroya Vísindaráð

28. novembur 2008
Fyrsti fundir í Vísindaráðnum

28. januar 2011
Fyrsti yvirskipaði granskingarpolitikkurin samtyktur og undirskrivaður

Arbeiðsætlan fyri verksetan av Vitan & vøkstur

8. apríl 2011

Mentamálaráðið biðjur Granskinarnevndina um at gera eitt tilmæli um arbeiðsætlan

11. februar 2013

Tilmæli frá Granskingarnevndini klárt: 17 konkret tilmæli

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Tilmæli um arbeiðsætlan fyri verksetan av Vitan & Vøkstri

Gransking í Føroyum: ein varislig SWOT-analysa

Styrkir	Veikleikar
• Nógvir einstaklingar og smærri bólkar sum gera týdningarmikla gransking • Glottar av gransking á altjóða excellence støði • Partar av vinnuni gera íløgur í gransking	• Fragmenterað granskingarumhvørvi - bæði stovnsligt og geografiskt • Støddin av flestu granskingarumhvørvum undir kritiskan massa • Samskifti millum politiska skipan og granskingarstovnar veikt
Møguleikar	**Hóttanir**
• Gott útbúgvingar- og vitanarstøði í Føroyum – og rættiliga nógvir føroyingar við granskingarførleikum • Fiski- og alivinnan hevur fíggjarliga megi til at stuðla vinnugransking • Økt samstarv við grannalond um gransking m.a. við ES-fígging	• Politiska skipanin fær ikki sett eina klára og fasta kós fyri føroyskari gransking • Føroysk gransking maktar ikki at kappast á altjóða excellence støði - hetta minkar um áhugan fyri samstarvi innlendis og útlendis

Gransking í Føroyum: hvat nu?

Trý persónlig tilmæli

1. Granskarar í Føroyum mugu savnast enn meira – bæði stovnsligt og geografiskt – við Fróðskaparsetrinum sum nátúrligum miðdepil fyri gransking á hægsta støði

2. Karmarnir fyri føroyskari vinnulívsgransking eiga at verða styrktir

3. Gev einum landsstýrismanni/kvinnu ábyrgdina fyri allari gransking í Føroyum, og styrk formella sambandið millum fyrisiting og granskingarstovnar

Takk fyri